# TILTØK

**Hebron, Argir**
Sunnudagin 4. jan. kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Á møtinum talar Sverri Steintún. Sunnudagin verður eingin sunnudagsskúli. Sunnudagsskúlin byrjar aftur sunnudagin 11. januar við nýggjársveitslu. www.hebron.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudagin 31.12. Midnáttar gudstænasta kl. 23.00.
Hósdagin 1. jan. Ársins fyrsta møti kl. 18.
Sunnudagin 4. jan. Møti bert kl. 11. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Sunnudagin 4. jan. kl. 18 Møti.

**Katólska kirkjan**
Nýggjársdag kl. 17 Hámessa v/ Pater Lars Messerschmidt í mariukirkjuni.
Fríggjadagin 2. jan. kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardagin 3. jan. kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Hámessa v/ Pater Lars Messerschmidt í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Hósdagin 8. jan. kl. 20 Taizekvøld í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Nýggjársdag 1. januar Gudstænasta kl. 11.

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin 3. jan. kl. 16.30 Bønarløta – kvinnur.
Sunnudagin 4. jan. kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 byrjar Heimsbønarvikan við møti v/ Johannes Mortensen.

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin 30. des. kl. 17 í KFUK: Jólafest fyri várgleði, títtlingar og onnur.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnukvøldið einki møti.
4. januar aftur sum vant.

**Missiónshúsið Libanon, Sørvágur**
Jólafestin verður í kvøld kl. 19.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Nýggjársdag kl. 18 Møti. Eingin sunnudagsskúli. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.jesus.fo

**Samkoman Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Týsdagin kl. 19 Nýggjársfest í Betania. Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Nýggjársdag kl. 18 Evangel. møti, Eyðun Christiansen talar.

**Betel, Vágur**
Onskvøldið 31. des. kl. 23 Bønarfundur.
Nýggjársdag kl. 19 Nýggjársveitsla fyri vaksin.
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 18 Evangel. fundur.

**Felagið Tórshavn**
Týsdagin 30. desember kl. 19.30 verður vitja í Ebenezer. Tilmelding.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
**Tilhaldið er stongt frá 23. desember til 5. januar 2004.** Vit ynskja øllum eini góð og hugnalig jól og takka fyri tað skjótt farna.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.*
**Jólafrí til 5. januar 2004.** Vit í Fløvanum ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár, við tøkk fyri tað farna.

*Eins og vanligt er, verður byrjað við einum Guðs orði, og framvegis eru luttakararnir vælkomnir at taka eitt og hvørt ítriv við sær, eitt nú stokkar o.a. Bløðini eru til taks í Fløvanum. Serflutningstænastan v/ Andreas Poulsen er byrjað. Hava tygum tørv á koyring, ringið vinarligast tlf. 448051.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa.
Mikudagurin 17. des. er seinasta dagur Tilhaldið er opið undan jólum. Vit hittast aftur mánadagin 5. jan. í komandi ári. Gleðilig jól og eitt gott komandi ár.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, miku- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.acadanmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.
Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilafelagið**
*felagið fyri apopleksi- og afasirakt*
Íslandsvegur 10
tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

**Javni**
Skrivstovan er stongd. Opið er aftur týsdagin 6. januar 2004. Ringjast kann til tlf. 314827. Teldupostur: javni@post.olivant.fo

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 13.00-16.00.
**Fibromyalgibólkurin:** Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
**Foreldraumboð:**
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50.

**Deyvafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10B*
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597, fartlf. 222381, skrivitlf. 316929 fax 313609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo heimasíðan: www.deaf.fo

**Teknmálstulkatænastan**
Um jólini er skrivstovan stongd frá 22. desember til 4. januar 2004.

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
*Íslandsvegur 10c*
*FO-100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Tlf. 317373, fartlf. 264839 faks. 310813
Teldupostur: mbf@mbf.fo
Heimasíðan: www.mbf.fo

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16 · 100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo

**Demensfelagið** [continued:]
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102. Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

**Sinnisbati**
Íslandsvegur 10 C, 100 Tórsh.
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur: sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664 Beinta tlf. 310574 Henning tlf. 314783.

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 314796, Hallbjørg

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.

**LISA -**
*Skrivstovan hjá Listafólkasambandið Føroya í Pætursarstovu*
Tlf: 320197
Teldupostur: lisa@lisa.fo
Heimasíða www.lisa.fo
Opið: mánad. - fríggjad. kl. 9-12, tó týsd. kl. 16.30 - 20.30.

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 15 til 18. LFÚ ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16 til 18.
Tinghúsvegur 18, 3. hædd, Tórshavn.
Tel. 310220 (skrivstovan)
tel. 315015 (ráðgevingin).
Teldupostur: lfu@post.olivant.fo
Heimasíða: www.lfu.fo

## PRÓGV

Tina Ziska, Tórshavn, hevur á Den Kgl. Veterinær- og Landbohøjskole, Institut for Økologi, Sektion for Zoologi, lokið prógv sum laborantur.

19. desember fekk Per Magnus Thomsen, Syðrugøtu, prógv sum cand. merc. frá Handilsháskúlanum í Århus. Umframt at hava lisið við Handilsskúlan í Århus, hevur hann eisini lisið í Corvallis, Oregon USA og í Leipzig og München í Týsklandi.

## 80 ÁR

Sunnudagin 4. januar 2004 fyllir Jona Henriksen, fyrrverandi KFUK-skrivari 80 ár. Dagurin verður hildin í KFUK frá kl. 15-18.

## 90 ÁR

Fríggjadagin 2. januar fyllir Kartni Winther, Tórshavn, 90 ár. Opið hús verður í Hornahúsinum frá kl. 16 sama dag.

## SILVURBRÚDLEYP

Fríggjadagin 2. januar hava Annvør og Nordin Manai, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

## GULLBRÚDLEYP

Mikudagin 31. desember hava hjúnini Hanna og Sigurd á Brúgv Johannesen, Vestmanna, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum. Tey, ið vilja heilsa uppá gullbrúðarparið eru hjartaliga vælkomin frá kl. 17.00.

Nýggjársaftan hava hjúnini Hanna og Karl Isaksen í Klaksvík verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini á Traðargøtu 13 frá kl. 16.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.



## FILMSTEIGURIN

# Scary Movie 3

Tíðindakvinnan, Cindy Campbell, stríðist fyri at finna søguna, sum kann gera hana víðagitna. Tá ein røð av løgnum hendingum taka seg upp á bóndagarðinum hjá Tom Logan, sær hon alt fyri eitt ein møguleika, og fer hon í holt við at kanna málið.

Søgan vísir seg tó skjótt at fevna um nógv meira, enn bara nakrar løgnar hendingar. Tá hon granskar málið, fær Cindy at vita frá »Orpheus« at hon er tann einasta eina, sum er kosin at hjálpa forsetanum at bjarga tjóðini undan rúmdarverum, men hetta er sum frálíður minsti parturin av hennara trupulleikum. Skjótt er talan um sjónbond við boðum sum drepa, Hulduslig børn, høgt stílandi hvítar rapparar og konspiratiónsteoriir í fullari støðd.





Og arbeiðið hjá Cindy fær eisini fólk at fylkjast kring hana. Hon skal nú royna at bjarga jørðini, loysa eina rúgvu av trupulleikum og ikki minst, so skal hon eisini hjálpa heiminum undan…Michael Jackson.

Tað er Davic Zucker, sum hevur leikstjórnað filmin, og tey, sum bera kenslu við navn hansara, vita, at her er talan um eina ørandi røð av komiskum hendingum, sum í nógvum førum eru púrasta burturvið, og sum í stóran mun gera gjøldur burtur úr væl umtóktum filmum, sum hava verið frammi seinastu tíðina.

Hesa ferð eru tað serliga, The Ring, The Matrix, Reloaded, 8 Mile og The Others, sum fáa toyggið, men eingin leikstjóri man tó kenna seg tryggan, tá Zucker fer ígongd. Og tað hava teir so heldur onga orsøk til at gera.


**HAVNAR BIO**
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 30.12. | kl. $14^{00}$ | Týsdagin | 30.12. | kl. $18^{00}$ |
| Týsdagin | 30.12. | kl. $22^{15}$ | Hósdagin | 01.01. | kl. $14^{00}$ |
| Hósdagin | 01.01. | kl. $18^{00}$ | Hósdagin | 01.01. | kl. $22^{15}$ |
| Fríggjadagin | 02.01. | kl. $18^{00}$ | Leygardagin | 03.01. | kl. $18^{00}$ |
| Sunnudagin | 04.01. | kl. $18^{00}$ | | | |

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

START ÅRET MED EN MEGA GRINER




**Frumsýning – Billettprísur: 65,- kr.**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 02.01. | kl. $20^{00}$ | Fríggjadagin | 02.01. | kl. $22^{00}$ |
| Fríggjadagin | 02.01. | kl. $24^{00}$ | Leygardagin | 03.01. | kl. $20^{00}$ |
| Leygardagin | 03.01. | kl. $22^{00}$ | Leygardagin | 03.01. | kl. $24^{00}$ |
| Sunnudagin | 04.01. | kl. $19^{45}$ | Sunnudagin | 04.01. | kl. $22^{15}$ |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 30.12. | kl. $17^{30}$ | Týsdagin | 30.12. | kl. $20^{15}$ |
| Týsdagin | 30.12. | kl. $23^{00}$ | Hósdagin | 01.01. | kl. $17^{30}$ |
| Hósdagin | 01.01. | kl. $20^{15}$ | Hósdagin | 01.01. | kl. $23^{00}$ |
| Fríggjadagin | 02.01. | kl. $22^{30}$ | Leygardagin | 03.01. | kl. $22^{30}$ |
| Sunnudagin | 04.01. | kl. $21^{45}$ | | | |




**Billettprísur: 45,- kr.**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 30.12. | kl. $15^{00}$ | Hósdagin | 01.01. | kl. $15^{00}$ |
| Fríggjadagin | 02.01. | kl. $17^{30}$ | Leygardagin | 03.01. | kl. $17^{30}$ |
| Sunnudagin | 04.01. | kl. $17^{30}$ | *– Seinasta sýning* | | |

**HAVNAR BIO**
*ynskir viðskiftafólki sínum eitt gott nýggjár*